

# B36 TÓK IKKI AV KJANSUNUM

**VODAFONEDEILDIN** Í fótbólti ræður um at taka av kjansunum tá teir eru har. Hetta fekk B36 at sanna sunnudagin, tá ÍF var á vitjan í Gundadali

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| B36 | 1 |
| ÍF | 1 |

B36 hevði allar møguleikar at avgera dystin longu í fyrra hálvleiki, men tóku bert av í tí eina førinum. Tá dugdu Fuglfirðingar betur, og gagnnýttu ein av sínum fáu møguleikum, og tað var nokk til at fáa javnleik í Gundadali.

Tað er eingin ivi um at javnleikurin móti fuglfirðingum er ein strika í roknskapinum hjá árstalsfelagnum úr høvuðstaðnum. Serliga eftir at hava leikt fuglfirðingar út av vøllinum í fyrra hálvleiki, fyri so at missa takið á dystinum eftir steðgin.

Tað var ikki nógv, sum bendi á at ÍF skuldi fáa stig við sær aftur til Fuglafjarðar, eftir ein sera vánaligan fyrra hálvleik. Men ÍF skal hava rós fyri teirra hugburð eftir steðgin, sum hevði við sær, at fuglfirðingar kundu fara norð aftur við einum stigi.



## POWER GULL

*B36 »Power play« í fyrra hálvleiki, men Rógvi vísti sítt »gull-virði« í seinna.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### B36 »powerplay«

Frá dystarbyrjan trýstu vertirnir fuglfirðingar langt aftur á vøllin. ÍF hevði trupult við at fáa samanhang í spælið, og alt ov ofta endaði tað við eini feil sending, sum hevði við sær at B36 kundi seta eitt álop í gongd. Serliga vóru tað kviku áleyparnir hjá B36, sum voldu heldur tungu ÍF verjuni stórar trupulleikar

Soleiðis bylgjaðu álopini oman móti ÍF málinum, og tað var bara spurningur um tíð áðrenn tað gekk galið hjá fuglfirðingum. Tá góðir 30 minuttir vóru leiktir bragdaði hjá B36. Hjalgrím Elttør stútaði bóltin í netið, eftir skjótt og gott álopsspæl, sum tó byrjaði við at hjá ÍF enn einaferð misti bóltin í uppspælinum.

Hóast B36 hevði málmøguleikar til at skora fleiri mál, so kom bert tað eina málið í fyrra hálvleiki.

### Rógvi er »gull verdur«

Tey sum væntaðu at vertirnir fóru at halda á við at trýsta í seinra hálvleiki, tóku feil. Tað var sum um heimaliðið ikki offraði líka nógv í álopsspælinum. Av tí sama dovnaði spælið nakað, og tað gagnaði fuglfirðingum.

Eftir at hava verið útspældir í fyrra hávleiki, so komu gestirnir væl betur við í dystin. Serliga Andy Olsen og Nenad Saric á ávíkavist vinstra og høgra vongi blivu sjónligir, og komu teir til nøkur vandamikil innlegg.

ÍF hevur ein av allarbestu áleyparunum í Vodafonedeildini í Rógva Jacobsen, og varð hetta aftur staðfest í Gundadali sunnudagin. Rógvi er sterkur, og kann halda uppá bóltin. Men hann er eisini ein hóttan í luftrúminum, og tað vísti hann í 68. minutti, tá hann stútaði bóltin umvegis stongina í netið til 1-1.

Hóast bæði liðini royndu at fáa vinnandi málið, so komu ikki fleiri mál í dystinum.

Sostatt endaði dysturin millum B36 og ÍF 1-1. Ein dystur har munurin á fyrra og seinra hálvleiki vóru sum dagur og nátt. Tískil er tað kanska ikki av leið at liðini býttu stigini, hóast tey í B36 iðra seg um at arbeiðið ikki var gjørt liðugt meðan dagur var.